# Jólamaðurin aftur á Áarvegnum

Gamli Jólamaðurin, sum áður sat so trúliga upp undir hvørji jól í sýnisglugganum hjá Katrinu Christiansen við Áarvegin og skrivaði niður jólaynski, er nú komin aftur á gamla pláss sítt í sama, gamla vindeygað.

Mong munnu minnast, hvussu jólini fyrst vóru veruliga í hondum, tá Jólamaðurin var at síggja har. Børn eins væl sum vaksin gleddust um at síggja hesa hugnaligu býarmyndina, sum á sín serstaka og einfalda hátt boðaði høgtíðina, sum nú var í hondum.

Fyri nøkrum árum síðani orkaði Jólamaðurin tó ikki meira. Ellin hevði fingið tak í Jólamannin, og noyddist hann at siga starvið frá sær, hóast hetta helst varð gjørt við ringum tannabiti.

Fólkini handan Skipalistan hava tó fingið hugskotið at hava jólasýning í hesum sama glugga. Og so var heldur ikki fjart at hugsa sær, at fáa gamla jólamannin aftur á staðið.

Og hetta hevur nú eisini borið til. Eitt nú hevur Sosialurin skrivað um illa fyrikomna jólamannin. Tað fekk menn hjá P/F Leif Mohr at taka so synd í honum, at teir gjørdu av at leggja hann undir skurð.

Skurðviðgerðing eydnaðist, og sjúklingurin livir enn.

Í ár hevur hann so staðið í einum minni glugga í handlinum hjá Katrinu Christiansen í Bringsnagøtu 6, men nú er hann so boðin oman á Áarvegin, har Skipalistin hevur jólasýning. Ein innbjóðing, sum hann við gleði hevur tikið av.



*Gamli jólamaðurin er nú komin aftur á røttu hillina. Í sýnisgluggan við Áarvegin*


























